# Dansisýning fyri børn

FRAMFØRSLA
*Tíðindaskriv*

Danski dansibólkurin Åben Dans framførir barnasýningina »Arme og Ben – og noget ind emellem« í Norðurlandahúsinum týsdagin 13. mai kl. 17.30, umframt at bólkurin gevur skúlasýningar týsdagin 13. mai kl 12.30 og mikudagin 14. mai kl. 10.30 og 12.30. Vitjanin hjá Åben Dans er partur av 25 ára hátíðarhaldinum hjá Norðurlandahúsinum. Bólkurin hevur framført »Arme og Ben« bæði í Danmark og altjóða tey seinastu tvey árini. Soleiðis mynda teir sýningina:


*Týsdagin og mikudagin verða dansisýningar í Norðurlandahúsinum fyri børn*

*Savnsmynd*

**Arme og Ben – og noget ind emellem**
Ein skemtilig dansisýning um likamið og við kroppinum
– til børn og tey vaksnu sum tey eiga

Tveir menn við hvør sínum kroppi ferðast við undran, skemtilyndi og álvara inn í ein heim, har alt er í broyting. Eitt stað har røddin verður tónleikur og har armar og bein verða til alt møguligt, sum vit ikki hildu, at tey vóru.

Børn í aldrinum 9 – 12 ár byrja at gerast flov um sítt egna likam. Føturnar verða stórir, armarnir langir og bróstini bølgna. Kanska líkist likamið tað hjá vinunum. Kanska ikki. Men tað veksur – og hvat blívur tað til?

Kroppurin er fullur í spurningum og tabuum. Kroppurin er, í heila tikið, ið so merkiligur.

Okkurt er millum armar og bein: Hvat?

Málbólkurin er børn millum 9 og 12.

Børn saman við vaksnum skulu verða í minsta lagi 6 ár.

Leiklongd: 45 minuttir

Kunning um Åben Dans: www.aabendans.dk. Kunning frá Norðurlandahúsinum: www.nlh.fo ella hedvig@nlh.fo" hedvig@nlh.fo.

Atgongumerki kosta 80 kr, men skúlasýningarnar eru ókeypis.

Skúlabólkar kunnu tekna seg á t-postadressuna hedvig@nlh.fo" hedvig@nlh.fo og upplýsa talið av næmingum og lærarum, navn á skúlanum og navn og telefonnummar á kontaktlæraranum. Pláss er enn til sýningarnar 13. mai og seinna sýningina 14.mai.

# Messe Basse í Hoyvík

**Á føðingardegi franska tónaskaldsins Gabriel Urbain Fauré hevur kórið Sólarmagn konsert í Hoyvíkar Kirkju annan hvítusunnudag**


*2. hvítusunnudag fer kórið Sólarmagn at framføra verk eftir franska tónaskaldinum, Gabriel Urbain Fauré*

SANGUR
*Tíðindaskriv*

Høvuðsverkið á konsertini er »Messe Basse« hjá Fauré, sum kórið framførir saman við urguleikaranum Oddvør Johansen. Solistur er eitt av okkara sprettandi sangtalentum, Arnóra Bech Petersen, sum hevur fingið frálæru í sangi hjá Susanne Brattaberg. Arnóra framførir eisini sálmin »Auf, auf mein Hertz mit Freuden« hjá týska barokktónaskaldinum Paul Gerhardt.

Tað tók sína tíð hjá Fauré at vinna viðurkenning og hann var av hesum áðum ofta tungur í huga, ein sinnisstøða hann sjálvur nevndi »Spleen« við atliti til Baudelaire. Í ævisøgu, sum Jean-Michel Nectoux skrivaði um tónaskaldið, verður Fauré samanborin við teir modernaðu yrkjararnar, hvørs endamál sambært Nectoux er tað sama; at úttrykkja tær størstu kenslurnar á einfaldasta hátt fyri at náa »kenslunar nakna kjøti«.

Verkini hjá Fauré hava sum heild eina hugtakandi melodiska styrki og hetta er eisini galdandi fyri vakra verkið Messe Basse, sum er ein styttri messa, ið tekur á leið tíggju minuttir at framføra. Umframt Messe Basse framførir kórið tveir føroyskar sálmar, sum ávikavíst Carl Nielsen og Knút Olsen hava gjørt lag til. Kórið Sólarmagn hevur undir leiðslu Fróða Sandoy virkað síðan 2000 og hevur m.a. havt svenskan vísusang og føroyskan kórtónleik á skránni. Hetta er fyrstu ferð kórið roynir seg við einum verki sum Messe Basse, sum er ein sera spennandi avbjóðing hjá bæði kóri og kórleiðara. Konsertin, sum fer at vara umleið ein hálvan tíma, verður mánadagin 12. mai klokkan 17.00.


*Kenda franska tónaskaldið, Gabriel Urbain Fauré, livdi í árunum 1845 til 1924*